Sosialurin og Rás2 hava gjørt eina longri samrøðu við Jóannes Eidesgaard, nú hann hevur sitið sum løgmaður teir fyrstu 120-130 dagarnar. Greinin er skrivað burtur úr hesi samrøðu. Eisini fara vit at hoyra brot av samrøðuni sum tíðindainnsløg á Rás2 komandi dagarnar. Samrøðan verður send í heilum líki eftir tíðindasendingina klokkan 17 fríggjadagin 13. juni

Tunlar størsta h

Tunga byrjanin hjá samgonguni hongur neyvt saman við málinum um undirsjóvartunlar í Sandoynna og Eysturoynna. Uttan samanbering hevur hetta málið verið tað truplasta hjá løgmanni at koma ígjøgnum teir fyrstu góðu fýra mánaðirnar. Seinast er hann komin í politiskt óveður, eftir at hava sáa iva um álitið á sjúkrahúsleiðsluna

POLITIKKUR

Kári Mikkelsen
Jón Brian Hvidtfeldt
Sosialurin og Rás2

Samgongan hevur nú góðar fýra mánaðir á baki, sum ikki kunnu sigast at vera farnir serliga stillisliga fram. Grundleggjandi ósemjur millum bæði flokkar og tingfólk innanhýsis í samgonguni komu longu fram undir samgongusamráðingunum. Hesar ósemjur hava hildið fram alla hesa fyrstu tíðina við samgonguni millum teir tríggjar flokkarnar, Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin.

Tað málið, sum hevur fylt nógv mest hetta fyrsta tíðarskeiðið, er málið um undirsjóvartunlarnar; serliga Sandoyartunnnilin og nú í seinastuni, Landssjúkrahúsið. Teir báðir tingmennirnir úr Sandoynni koyrdu teirra valstríð upp á at lova íbúgvunum í Sandoynni fast samband, og hetta hava teir hildið fast við eftir at vera komnir inn sum 16. og 17. maður í samgonguni.

- Tað einstaka málið, sum hevur verið akilleshælurin í samgonguni, hevur verið málið um tunlarnar. Hetta hevur yvirskuggað tey flestu onnur mál og gjørt, at minni orka hevur verið til at taka aðrar tættir upp í politikkinum, og tí kann hendan byrjanin tykjast at hava verið øgiliga tung. Úti millum manna hevur hetta borið boð um meiri politiskan ófrið, enn vit áður hevur sæð, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann ger vart við, at longu undir samgongusamráðingunum vistu partarnir, at málið um tunlarnar fór at vera eitt trupult mál, tí talan er um eina 17 manna samgongu, og tá var tann eini tingmaðurin úr Sandoynni avgerandi. Síðan samgongan varð skipað, eru teir tveir. Hetta merkir, at um ein ella báðir tinglimirnir tóku stuðulin undir samgonguni aftur, so var ikki longur talan um eina meirilutasamgongu.

- Samansetingin av samgonguni hevur gjørt, at vit hava brúkt nógvar kreftir upp á at mýkja tunlamálið. Eg vil ikki siga, at vit hava loyst tað, men vit hava í øllum førum roynt at mýkt tað. Av tí sama hevur verið avmarkað, hvussu nógva orku vit hava havt til onnur mál. Vit síggja til dømis, at tað tók munandi longri tíð at fáa fíggjarlógina niðan í Løgtingið hesaferð, enn tað gjørdi í undanfarnu samgongu.

Spurdur um hann angrar, at hann ikki tók av tilboðnum hjá Sjálvstýrisflokkinum um at koma upp í samgonguna, so meirilutin var størri, sigur Jóannes Eidesgaard:

- Sjálvandi er ein breið samgonga tryggari, um so er, at onkur loypur frá. Um tann møguleikin hinvegin er til staðar, at onkur kann gera tað, so er hetta tekin um, at politikkurin ikki er nóg væl samansjóðaður. Og at taka Sjálvstýrisflokkin inn eisini, hevði gjørt tunnilsmálið upp aftur meiri fløkt, tí flokkurin fór jú upp á val at siga nei til Sandoyartunnilin, meðan Skálafjarðartunnilin skuldi liggja í privatum felag. So eg trúgvi ikki, at hetta hevði foreinklað málið, men tvørturímóti gjørt tað uppaftur truplari, sigur løgmaður.

Einaferð sá út til, at tit skuldu hava hjálp frá Sjálvstýrisflokkinum fyri at fáa skúladepilin í Marknagili ígjøgnum í Løgtinginum. Tað gjørdist so kortini ein breið semja. Hetta var ikki nakað serligt tekin at vísa hjá eini nýggjari samgongu, at tit so skjótt skuldu út eftir hjálp frá einum andstøðuflokki fyri fáa politikkin hjá tykkum ígjøgnum?

- Hatta var ein mynd og eitt symptom upp á tann sama trupulleika, vit hava havt. Tá tú hyggur, hvør atkvøddi ímóti skúladeplinum, so eru tað somu persónar, sum hava strongt á við Sandoyartunlinum. Eg havi eisini sagt, at eg haldi tað vera ótrúliga langt úti, at politikarar taka eitt mál sum gísla fyri eitt annað mál.

Fiskivinnan stórar trupulleikar

Nógv hava undrast á, at samstundis sum stórur partur av fiskiflotanum liggur svínabundin við kai, tí tað ikki loysir seg at fiska, so hava tit í samgonguni og í løgtinginum brúkt tíðina at stríðast um tunlar. Hvat sigur tú til hesar atfinningarnar?

- Eg skilji hetta ómetaliga væl. Ivaleyst eru mong í Føroyum, sum ikki síggja samanhang í tingunum, og sum hava ringt við at fata, hvat tað er sum gongur fyri seg í tí politisku skipanini. At vit viðgera íløgur fyri milliardir uttan at nevna við einum orði, at vit hava veldugar trupulleikar úti í vinnuni. Hinvegin, tá tú ert politikari, so kanst tú ikki vera so stýrdur av, hvat gongur fyri seg í vinnuni. Tú noyðist alla tíðina at dyrka tað politiska spektrið, og um tað skuldi komið ein niðurgangstíð, so merkir hetta ikki, at alt annað skal steðga upp. Tú noyðist at hava eitt politiskt boð uppá, hvat skal henda. Og viðurskiftini í fiskivinnuni hava vit umrøtt við reiðarafelagið, og eg havi avtalu við formannin, at vit skulu venda aftur til spurningin, um tingini útvikla seg. Men teir trupulleikarnir við høga oljuprísunum eru so kollossalir, at tað er nakað, sum hvørki reiðarafelagið ella landsstýrið hava nakra skjóta loysn uppá. Vit fara at geva royndarloyvi til onkrar av lemmatrolarunum til at partrola fyri at vita, um tað ber til og harvið spara olju. Annars er tann trupulleikin fyri trolaraflotan so stórur, at tað ikki er gott at vita, hvat tað endar við, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður ger vart við, at hann heldur vildi brúkt ein spyrjitíma í løgtinginum uppá, hvat gerast skal við fiskivinnuna, um hendan støðan heldur fram og kanska versnar.

- Tí er tað ongantíð ov skjótt at fáa avgreitt tunnilsmálið, so vit fáa leysgivið alla orku til onnur mál.

Hevur tú so ikki havt tamarhald á tí politiska kjakinum og ikki kunnað stýrt tí?

- Tað haldi eg meg partvís hava havt, men eg kann heldur ikki siga tað, at hesir hundraðatals sandoyingarnir, sum komu til Havnar at seta ein stemning í gongd, ikki skuldu koma. Í demokratinum eru nøkur ting, sum tú noyðist at virða. Og tí er tað ikki eg, sum avgeri, nær man ikki diskuterar tunlar meiri í Føroyum. Men tann loysnin vit funnu á samgongufundinum, haldi eg er tann frægasta beint nú. Nevniliga at lata eina nevnd arbeiða fram til ólavsøku og so vóna, at vit hesa tíðina kunnu fáast við politikk. Mín vón er eisini, at nevndin leggur eina loysn fram á Ólavsøku, so vit kunnu fremja nøkur mál uttan at fáa tað stóra rokið um tað.

Reytt kort frá Ingeborg

Tað sær út til, at tín flokkur, Javnaðarflokkurin, hevur fingið arbeiðararørsluna á nakkan. Er ætlanin hjá tær miseydnað um at snara meiri til vinstru í nýggju samgonguni?

- Nei, tað haldi eg ikki, og tað harmar meg sera nógv, at málið tú sipar til, útlendingamálið, hevur